Tónleikur

**Føroysk DJ mentan og elektroniskur tónleikur • Føroysk DJ mentan og e**

# Føroyingar vita ikki betur

**Føroyingar kenna hann best sum oddamann í bólkinum Lama Sea. Íslendarar kenna hann sum oddamann í bólkinum Bloodgroup. Nýliga hevur hann fingið sær navnið DJ·ÓR, ið hann ger egnan tónleik og DJ'ar við.**
**- Klubbar og kaffihús eru ov tilvildarliga samansett í Føroyum. Tað manglar persónligheit í, men tað eru so fá, ið tora at risikera nakað, sigur maðurin handan nøvnini, Janus Rasmussen**



*Janus Rasmussen er oddamaður í bæði føroyska bólkinum Lama Sea og íslendska Bloodgroup. Hann ger elektroniskan tónleik við vinmanninum Sakarisi Joensen undir heitinum High Hat og er DJ og ger egnan tónleik við navninum DJ·ÓR*

SAMRØÐA

Janus Rasmussen, eisini kendur sum DJ·ÓR, byrjaði at spæla rokkgittara sum 11 ára gamal. Heilt stutt eftir hetta opnaðust eygu hansara fyri teldum, elektroniskum ljóðum og samplingum, tá bólkar sum t.d elektroniski Aphex Twin troðkaðu seg inn í hugaheim hansara. Janus hevur verið frontur í bólkinum Lama Sea í fleiri ár og hevur saman við vinmanninum Sakariasi Joensen gjørt elektroniskan tónleik undir heitinum High Hat, sum m.a hevur remiksað løg fyri Heiðrik á Heygum.

Janus býr nú í Íslandi og er við í væl umtókta elektro-popp bólkinum Bloodgroup. Hann hevur altíð gjørt egnan tónleik, og tað er ikki so langt síðani, at hann byrjaði at gera tónleik undir egnum navni; DJ·ÓR. Stílurin, hann fæst við, er tekno/elektro/house, sum hann higartil hevur framført m.a í Barinn og Organ í Reykjavík og til Undirbeat í Føroyum.

*Hvørjar royndir hevur tú fingið sum DJ í Føroyum og í Íslandi?*

- Mínar royndir sum tónleikari og DJ eru, at tað er ræðuliga stórur munur á uppfatanini av DJ'ing í Føroyum og Íslandi. Í Íslandi er DJ mentanin ótrúliga stór. Hetta ger eisini, at tað er rættiliga torført at koma fram, um ein ikki hevur eitt navn ella umdømi frammanundan. Tað er eisini ræðuliga fjølbroytt tónlistarliga sæð. DJ'ing er á skránni hvørt kvøld ymsastaðni í býnum. Og tað eru allir tónleikastílar, ið koma fram; reggae, hipp hopp, elektro, tekno osfr. T.d er eitt stað, sum eitur Prikið, ið bara hevur hipp hopp leygarkvøld, greiðir Janus frá í telefonini.

- Hetta hevði ongantíð borið til í Føroyum; at tað eru DJ'ar, ið bara spæla eitt slag av tónleiki; at tað eru støð, sum eru ymisk við hvør sínari persónligheit. Alt er bara totalt tilvildarligt í Føroyum. Og orsøkin, trúgvi eg, er, at tað ikki eru nóg nógv fólk til at fylla eitt stað, sum bara er eitt ting. Tí eru barrir og kaffihús í Føroyum ofta bara ein tilvildarlig blanding av øllum møguligum.

*Hví er tað so tilvildarligt, og hvussu heldur tú, at støðan er í dag?*

- Fyri bara tveimum árum síðani var eingin ordilig DJ mentan í Føroyum. Tað vóru bara teir somu DJ'arnir, sum spældu sama tónleikin, ið fólkið vildi hoyra. Tað hevur í grundini ikki verið nøkur DJ mentan, fyrr enn nú seinastu tíðina. Síðani Grundina á G! Og Undirbeat og alt tað. Og tað er eisini rættiliga nógv hent, síðani hesi tingini byrjaðu. Nú hevur DJ'in fingið meira kontroll, meira fríheit at úttrykkja sína list og spæla tað, ið hann umboðar sjálvur. Tað sæst eisini betri og betri, m.a á myspace, hvussu nógvir føroyingar liggja inni við heimagjørdum programmeringum og miksum. So útviklingin er har, og hon fær spakuliga ferð á. Men tað er ikki nakað í Føroyum, sum hevur eggjað mær til at blíva DJ. Tað var heldur ikki, fyrr enn eg fór av landinum og upplivdi ordiligar DJ'ar, sum hava tað sum yrki, og sum ganga uppí tað sum ein form fyri list, at eg fekk áhuga fyri tí sjálvur.

*Hvør heldur tú, at orsøkin er til vantandi fatanina fyri DJ'ing í Føroyum?*

- Eg haldi næstan, at orsøkin til hendan mangulin er, at føroyingar bara ikki vita betri. Eg visti ikki sjálvur av nøkrum, fyrr enn eg slapp at hoyra DJ'ar aðra staðni. Bara fyri tveimum árum síðani kundi tað slett ikki lata seg gera at spæla tónleik, sum eingin kendi. Tað er bara mentaliteturin í Føroyum. Eingin torir at risikera nakað. Alt hevur gingið fínt, og eingin hevur viljað broytt tað. Men nú vilja fólk hava nakað annað. Mann vil hava broyting og uppdatering. Og tað broytist so smátt, m.a við Undirbeat. Tað er komin ein linja ímillum tey, ið bara vilja ballfallera fyri einhvønn prís og tey, ið vilja hava nýggjar tónar, uppdaterað umhvørvi og avbjóðandi náttarlív.

*Hvat er tað, sum vit mangla í Føroyum?*

- Einasta staðið, sum fyri mítt viðkomandi og hóast vánaligar umstøður, hevur eina greiða persónligheit og umboðar ein ávísan stíl, er Cippo, tá Undirbeat er. Fólk eru troytt av tilvildarligheitum. Tey vilja hava nakað egið og nýtt. Trupulleikin tykist bara vera, at tey, ið vilja hava eitt tiltak sum hetta, ikki eru í Føroyum, og tí ber tað illa til at hava hetta tiltakið oftari enn aðru hvørja viku. Eg trúgvi, at tað botnar í trupulleikanum við, at tað eru so mong, ið fara av landinum at taka hægri lesna. Hetta eru fólk, ið hava visiónir, ið vilja uppliva nýggj ting, og ið fáa sítt sjónarhorn víkað við at fara av landinum. Høvdu vit havt fleiri møguleikar fyri hægri útbúgving í Føroyum, høvdu hesi fólkini helst verið verandi í landinum, og eitt tiltak sum m.a Undirbeat hevði kunnað borið seg nógv betri. Føroyskt náttarlív hevur yvirhøvur stóran tørv á at blíva meira dynamiskt og avbjóðandi, sigur Janus.




*Janus skal við bólkin sínum, Bloodgroup, framføra komandi tíðina á m.a Great Escape Festival í Onglandi og á Roskilde Festivalinum í Danmark*

## Finn tónleikin

Janus skal komandi tíðina framføra við bólki sínum, Bloodgroup, á eitt nú Organ í Reykjavík við tveimum bretskum bólkum, á Great Escape Festival í Onglandi og seinni í summar á Roskilde Festivalinum. Hoyr tónleikin hjá DJ·ÓR á myspace.com/djor, harímillum eitt remiks, ið hann hevur gjørt av lagnum »Moving like a Tiger« hjá Bloodgroup. Tú kanst eisini hoyra tónleikin hjá elektro duoini High Hat, ið Janus hevur saman við Sakarisi Joensen, á myspace.com/highhatband. Fylg annars við her í blaðnum og á Planet.fo, nær Janus aftur skal framføra í Føroyum.

## Føroyskir elektroprofilar á Myspace.com

**DJ·ÓR**
Janus Rasmussen
myspace.com/djor

**Heiðrik**
Heiðrik á Heygum
myspace.com/heidrik

**Bryn**
Brynjolfur á Heygum
myspace.com/sexyelectrobaby

**Sakaris**
Sakaris Joensen
myspace.com/sakariselectro

**Playmo**
Dávur Poulsen
myspace.com/playmodj

**She Loops The Endless Strip of Tape**
Ólavur Jákupsson
myspace.com/sheloopstheendlessstripoftape

**Spencer Jones**
Rólant av Reyni
myspace.com/spencerjonesproject

**The Source**
Kjartan Magnussen
myspace.com/thesourcekm

**Sleepless Pedestrian**
ikki navngivin
myspace.com/sleeplesspedestrian

**Pulze**
Jón Jensen
myspace.com/pulzemusic

**Lajf**
Leif Petersen
myspace.com/lajfp

**Nin10do**
Jan Nystrøm
myspace.com/nin10domusic

**Électro Valentíno**
Dan Helgi Helgason í Gong
myspace.com/danghelgi

**The Ghost**
Filip Mortensen og Urbanus Olsen
myspace.com/theghostband1

**High Hat**
Janus Rasmussen og Sakaris Joensen
myspace.com/highhatband

**ORCA**
v/ Jens L. Thomsen
myspace.com/jenslthomsen

**Bloodgroup**
v/ Janus Rasmussen
myspace.com/bloodgroup